

Magni Arge og Chilingarov á Arctic Circle í Reykjavík.Mynd Bjarni Arge

# Magni Arge hitti heimskendan russiskan polargranskara

**Jan Müller**

18.10.2015 - 15:53

Oljan.fo

Jan Müller úr Reykjavík

Ikki kann sigast annað enn, at føroyskir politikarar eru væl umboðaðir her á arktisku ráðstevnuni í Reykjavík. M.a. hava báðir teir føroysku fólkatingsmenninir nýtt høvi at vitja ráðstevnuna. Og tað er týdningarmikið fyri Føroyar, at allar góðar kreftir verða brúktar at seta Føroyar at arktiska heimskortið, nú stórveldini og múgvandi tjóðir kring heimin royna at fáa fótafesti her eisini. Og í tí sambandi hevur tað nógv at siga at vísa andlit - at vera á staðnum, har tú kann netverka og knýta sambond.Vera eitt gott umboð fyri sítt land.  Tað eydnaðist t.d. nýggja fólkatingsmanninum, Magna Arge, at hitta fleiri av teimum mest týðandi fólkunum á ráðstevnuni. eitt teirra var eingin minni enn heimskendi russiski polarserfrøðingurin, Artur Chilingarov, sum fyri nøkrum árum síðani sum tann fyrsti nakrantíð festi russiska flaggið á havbotnin á sjálvum Norðpólinum.